# Alitíðindi

**Fiskaaling p/f 430 Hvalvík**

**NR 1 - 1997**

# Smoltstøðirnar

## Hagtøl fyri smoltstøðirnar í 1996

Andrias Reinert

Inngangur

Undanfarin ár hevur verið meira tilvildarligt hvørja árstíð spurnarbløð eru send alarum. Í 1996 vórðu spurnarbløðini send øllum smoltstøðum og alistøðum á sjónum fyri jól, og biðið var um at fáa bløðini aftur innan 20 januar í 1997. Ætlanin er framyvir at fáa arbeiðið við spurnarbløðum frá hondini um ársskiftið, og skuldi tað verið fyrimunur bæði hjá alarunum, sum kortini um hetta mundið gera upp hvussu farna árið hevur hilnast, og somuleiðis skuldi borið til at fingið yvirlit yvir gongdina í alivinnuni undanfarna ár tøkt væl fyrr.

Alarar hava sum heild gjørt sær góðan ómak at svara spurningunum neyvt, og gott samsvar er ímillum upplýsingar frá smoltstøðum, og tølini, sum støðirnar á sjónum geva upp.

Spurnarbløð vórðu send 18 smoltstøðum, og svar er komið frá øllum.

Niðanfyri verður tikið saman um gongdina á smoltstøðunum í 1996.

### Lívfiskur

Tvey feløg, Fiskaaling p/f og Fútaklettur p/f ólu lívfisk burturav við tí fyri eygað at lata rogn til smoltstøðirnar. Umframt hesar báðar "lívfiskastøðir", hava tríggjar vanligar smoltstøðir strokið egnan fisk í 1996. Talið av lívfiski, sum er keypt og selt millum alistøðir í 1996, sæst í Talvu 1.

Talva 1. Keyp og søla av lívfiski í 1996

| Fiskaslag | Rognafiskar | Siljafiskar | Geldfiskar |
|---|---|---|---|
| Laksur | 1364 | 409 | 800 |
| Ælabogasíl | 450 | 250 | - |

Geldfiskurin er ætlaður til lívfisk í 1997.

## Laksur í 1996

Rogn

Flestu smoltstøðirnar keypa rogn, sum eru komin í eyga, frá lívfiskastøðunum, og eisini tær støðir, sum hava strokið egnan fisk, hava keypt nakað av rognum í 1996.

Tilsamans vóru 2.900 litrar av laksarognum (komin í eyga), lagdir til klekingar á smoltstøðunum.

Talva 2. Laksarogn á smoltstøðunum á heysti 1996

| Nøgd av rognum | Tal av støðum |
|---|---|
| Minni enn 100 litrar | 1 |
| 100 - 200 litrar | 3 |
| 200 - 300 litrar | 10 |
| Meira enn 300 litrar | 1 |

Tvær smoltstøðir, sum ala fiskin í kørum, og ein sum elur í nótum á SEV byrging, hava ikki umstøður at klekja síla- ella laksarogn. Tær keypa tí størri maðkapirrur frá øðrum smoltstøðum.

Yngul og maðkapirrur

Tilsamans 643.000 laksamaðkapirrur vórðu latnar millum smoltstøðir í 1996. Meginparturin er flutningur millum støðir, sum arbeiða saman, og talan er bæði um støðir sum ala maðkapirrurnar víðari til smolt í kørum og í nótum á SEV byrgingum.

Flutningur millum støðir í sama felag er ikki roknaður við her.

Laksasmolt

Alt størri partur av laksasmoltinum í Føroyum verður latin alistøðunum á sjónum aðrar tíðir á árinum enn í mai-juni, sum var vanliga tíðin at koyra fisk á sjógv til 1994. Smoltið, sum fór á sjógv í 1996, er her gjørt upp eftir í hvørjum ársfjórðingi tað varð latið alistøðunum, og býtið sæst niðanfyri í Talvu 3 fyri smoltstøðirnar í hvørjum aliøki sær.

Talva 3. Smolt (tald í 1.000) býtt eftir í hvørjum aliøki smoltstøðirnar liggja og eftir hvørjum ársfjórðingi ið fiskurin er farin á sjógv í 1996.

| Ársfj. | 1 | 2 | 3 | 4 | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðoy. | | 247 | 796 | 520 | 1.536 |
| Eyst. E. | 343 | 643 | 337 | 936 | 2.259 |
| Miðøkið | 62 | 781 | | 453 | 1.296 |
| Vestanf. | | 723 | 592 | 37 | 1.352 |
| Suðuroy | 218 | 194 | 55 | 179 | 646 |
| Íalt | 632 | 2.588 | 1.780 | 2.125 | 7.116 |
| | 1. hálvár 3.212 | | 2. hálvár 3.904 | | |

Tølini í Talvu 3 eru bruttotøl, ella talið av fiski sum smoltstøðirnar lata alistøðunum á sjónum. Spurt verður eisini um nettotal, og her er meint við talið av fiski, sum er eftir í nótunum, tá tríggir mánaðir eru lidnir síðani fiskurin fór á sjógv. Hetta er eisini vanliga tað talið, sum smoltstøðin fær avrokning fyri.

Fyri knappar 5,9 milliónir av teimum íalt 7,1 milliónunum av laksasmolti, sum fóru á sjógv í 1996, eru bæði brutto- og nettotøl givin upp.

Hetta eru góð 82 % av laksasmoltinum, og tølini eru sett saman í Talvu 4, býtt upp sum omanfyri eftir hvørjum ársfjórðingi, ið fiskurin er farin á sjógv.

Vit síggja at 7,6 % er farið burtur av fiskinum, sum alistøðirnar á sjónum fingu í øðrum ársfjórðingi ella vanligu tíðina um várið. Nakað meira 9,1 % er farið av tí, sum fór á sjógv í fjórða ársfjórðingi, og tað hevur nú undanfarnu ár verið vanliga tíðin til "heystsmolt". Av teimum stívliga 150.000 smoltunum, sum vórðu latin fyrsta ársfjórðing, eru 18 % misfarin, og heili 23,7 % eru farin burtur av fiskinum, sum fór á sjógv í triðja ársfjórðingi.

Talva 4. Laksasmolt 1996, svinn fyrstu tríggjar mánaðirnar býtt eftir hvørjum ársfjórðingi fiskurin er farin á sjógv

| | Bruttotal | Nettotal | Svinn | Svinn % |
|---|---|---|---|---|
| 1. ársfj. | 150.730 | 123.638 | 27.092 | 18,0 |
| 2. ársfj. | 2.085.509 | 1.926.759 | 158.750 | 7,6 |
| 3. ársfj. | 1.724.931 | 1.316.200 | 407.831 | 23,7 |
| 4. ársfj. | 1.767.946 | 1.611.014 | 156.932 | 9.1 |
| *) | 131.460 | 117.600 | 13.860 | |
| Íalt | 5.860.576 | 5.095.211 | 765.365 | 13.6 |
| Íalt % | 100 | 86.9 | 13,6 | |

*) Býtið upp á ársfjórðing ikki uppgivið

Orsøkin til stóra svinnið samanlagt í fiskinum, sum fór á sjógv í fyrsta og triðja ársfjórðingi, er at nógv av hesum fiski hevði verið fongt við BKD og/ella furunkulosu á smoltstøðini, og harumframt fór nakað av

laksasmolti, sum hevði verið ljósstýrt, ov seint á sjógv.

Í fleiri førum gekst hinvegin heilt væl at koyra fisk á sjógv hesar fyrr "óvanligu" tíðir, og tað prógvar, at um fiskurin er frískur og rætt verður atborið, ber væl til at koyra laksasmolt á sjógv alla árstíð.

## Ælabogasíl

Rogn

Trýggjar smoltstøðir løgdu tilsamans 140 litrar av eygarognum undan ælabogasílum til klekingar.Ælabogasílini, sum vóru tøk til lívfisk á vári 1996 vóru smá, tey vigaðu umleið 3 kg/stk. Sílarognini vóru av hesi orsøk smærri enn vanligt í 1996. Fiskaaling p/f roknaði við at tað vóru 12.500 rognkorn í hvørjum litri av eygarognum, og faldað við hesum tali svara teir 140 litrarnir til 1,75 milliónir rognkorn, sum vórðu løgd til klekingar á vári 1996.

Sjóbúgvin síl

Bert tríggjar smoltstøðir lótu síl í 1996, og í Talvu 5 síggja vit býtið millum vár- og heystsíl, og hvussu stórt svinnið hevur verið fyrstu tríggjar mánaðirnar í sjónum.

Talva 5. Síl farin á sjógv í 1996, og svinn tríggjar fyrstu mánaðirnar

| | Bruttotal | Nettotal | Svinn | Svinn % |
|---|---|---|---|---|
| 2. ársfj. | 35.526 | 32.500 | 3.026 | 8,5 |
| 4. ársfj. | 310.160 | 287.400 | 22.760 | 7,3 |
| Íalt | 345.686 | 319.900 | 25.786 | 7.4 |

Flestu sílini eru farin á sjógv um heystið. Lítil munur er á svinni í vár- og heystsílum, og svinnið er av somu stødd sum í laksasmoltinum sum fór á sjógv til vanliga tíð í 2. ársfjórðingi.

## Goymsla pr.31.12.1996

Rogn og nýklaktur yngul

Samlaða nøgdin av laksarognum á øllum smoltstøðunum varð gjørd upp til 2.900 litrar. Hetta eru rogn sum eru komin í eyga, og rokna vit við 6.000 rognkornum pr. litur av rognum í miðal, svara 2.900 l av eygarognum til gott 17 milliónir rognkorn.

Um ársskiftið er nakað av laksarognunum klakt, og restin av rognunum eru skild enn eina ferð. Smoltstøðirnar geva upp pr. 31.12.96:

1.827 l av eygarognum og 4,4 mill. av nýklaktum yngli.

Samanlagt gevur hetta : 15,4 mill. rognkorn og yngul í alt.

Samlaða talið av laksayngli, sum smoltstøðirnar hava koyrt í kørini at byrjannarfóðra várið 1997, kann út frá hesum metast at hava verið millum 14 og 15 milliónir.

Maðkapirrur

Tilsamans høvdu smoltstøðirnar um ársskiftið 3.831.000 laksamaðkapirrur av 1996 árganginum, og

710.000 síl. Hetta verður mett at geva:

3.546.000 vársmolt og 621.000 síl ella tilsamans

4.167.000 laksasmolt + síl at seta út várið 1997.

Hesi tøl eru sammett við undanfarnu ár í Talvu 6 niðanfyri.

Talva 6. Ald smolt og smásíl 1994 - 1996 og forsøgn fyri vár 1997 (tald í 1.000)

| | Vár | | Heyst | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Laksur | Síl | Laksur | Síl | Laksur | Síl |
| 1997 | 3.546 | 621 | | | | |
| 1996 | 3.212 | 36 | 3.904 | 310 | 7.116 | 346 |
| 1995 | 4.116 | 441 | 3.643 | 145 | 7.759 | 586 |
| 1994 | 3.937 | 109 | 1.593 | 47 | 5.530 | 156 |

Hóast tað ikki ber til at gera nakra veruliga meting av hvussu nógv smolt (S1/2 smolt), ið verða til heystar, so bendir gongdin á smoltstøðunum á, at vit kunnu vænta væl fleiri heystsmolt í 1997 enn tvey tey undanfarnu árini.

Smoltstøðirnar í Føroyum hava yvirhøvur gjørt nógv meira av at ala heystsmolt, enn smoltstøðirnar í næstu grannalondum okkara hava gjørt. Sammeting við Scotland og Noregi er gjørd í Talvu 7.

Talva 7. Ald smolt í Føroyum, Scotlandi og Noregi (tald í túsund) og hvussu mong prosent ið eru heystsmolt (S1/2 smolt)

| | Føroyar | | Scotland | | Noregi | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Smolt íalt | % S1/2 | Smolt íalt | % S1/2 | Smolt íalt | % S1/2 |
| 1996 | 7.116 | 54,9 | | | | |
| 1995 | 7.759 | 47,0 | 26.540 | 10.0 | 99.844 | 22.4 |
| 1994 | 5.530 | 28,8 | 23.117 | 7,2 | 82.908 | 14,3 |

Ein týðandi orsøk, til at smoltalarar í Føroyum leggja seg so nógv meira eftir at ala heystsmolt enn alarar aðrastaðni, er tað svikaliga vatngrundarlagið, sum føroyski smoltalarin hevur at arbeiða við, í mun til flestu smoltstøðir í hinum londunum sum ala laks.

## Ymiskt

Fóðurnýtsla

Ikki allar smoltstøðirnar hava svarað spurninginum um fóðurnýtslu. Onkur av teimum smáu hevur brúkt

minni enn 5 tons av fóðri, og 10 smoltstøðir, sum hava gjørt nýtsluna av fóðri upp, hava í miðal brúkt 39,1 tons av fóðri í 1996. Trý ymisk fóðurmerki lata meginpartin av fóðrinum til smoltstøðirnar í Føroyum.

Koppseting

Sekstan smoltstøðir hava givið upp hvussu tær hava koppsett fiskin og í stuttum sær tað soleiðis út:

- 6 støðir hava bert stungið fiskin eina ferð; fur.+hitra+ vibr. - oljubaserað
- 2 støðir hava harumframt dyppað eina ferð
- 1 støð hevur umframt dyppað fiskin tvær ferðir
- 6 støðir hava dyppað tríggjar ferðir umframt at stinga
- 1 støð hevur fyrst stungið við vatn-baseraðum evni, og síðani við oljubaseraðum koppingarevni.

Umframt eru 99 l av IPN koppingarevni nýtt í 1996 á smoltstøðunum til laksamaðkapirrur. Hetta røkkur til 499.500 fiskar ella 7 % av laksasmoltinum, sum fór á sjógv.

Sílini eru vanliga bert stungin við oljubaseraðum koppingarevni - Fur + hitra + vibr. eina ferð áðrenn tey fara á sjógv.

Sjúka

Fimtan smoltstøðir hava svarað spurninginum um sjúku á støðini og í stuttum var støðan soleiðis í 1996:

- 9 støðir hava ikki fingið ávíst sjúku í 1996
- 3 støðir hava viðgjørt fyri furunkulosu
- 2 støðir hava viðgjørt fyri bæði BKD og furunkulosu
- 1 støð hevur viðgjørt fyri ringan táknubruna í 1996.

Støðir, sum hava haft bæði furunkulosu og BKD, hava mist heilt upp í helvtina av fiskinum á støðini, og svinnið í hesum fiskinum hevur verið stórt aftan á at hann er komin í sjógv.

Nú flestu smoltstøðir hava fingið sær útgerð at sóttreinsa vatnið, sum tær fáa inn á støðina, bendir gongdin skilliga á, at tær framyvir verða førar fyri at lata væl meira av frískum fiski til alistøðirnar á sjónum.

Manning

Á smoltstøðunum arbeiddu 59 fólk fast í 1996, og 24 "ársverk" vórðu umframt av eykaarbeiði. Í Talvu 8 er sammett við tølini, sum vórðu uppgivin frá smoltstøðunum í 1995.

Talva 8. Manning á smoltstøðunum í 1995 og 1996.

| Arbeiði | Fast | Eyka | Íalt |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1996 | 59 | 24 | 83 |
| 1995 | 58 | 17 | 75 |

Ein av orsøkunum, til at meira eykaarbeiði hevur verið á smoltstøðunum í 1996, er at riggað hevur verið til sóttreinsing av vatni, og í summun førum til endurnýtslu av vatni.

==============

Fiskasjúkutænastan hevur lisið ígjøgnum og veitt tilfar til teigarnar um sjúku og koppseting.

Tølini um aling av smolti í Skotlandi eru úr:

SCOTTISH FISH FARMS Annual Production Survey, Report of The Scottish Office Agriculture, Environment and Fisheries Department - Annual Survey of Fish Farms for 1995 - Marine Lab. Aberdeen.

Norsku tølini eru úr:

Statistikk for fiskeoppdrett 1995 - Fiskeridirektoratet - Bergen.